## Skal viðgerast í álvara

Grønlendingar eru misjavnir á málið um hóttanina hjá Lars-Emil Johansen at taka seg úr Fólkatinginum fyri at vísa sína misnøgd. Millum teirra, sum hava sagt sína hugsan, er landstingslimurin Josef Motzfeldt úr IA. Hann sigur við KNR, at umboðanin í Fólkatinginum skal ikki viðgerast út frá hugsanini hjá einum einstøkum persóni, men sum eitt álvarsmál. Sjálvur er hann fyri at avtaka umboðanina, men vit mugu kjakast um tað fyrst, sigur hann.



*Josef Motzfeldt vil hava grønlendingar at skifta orð um fólkatingsumboðanina (Mynd: KNR)*

## Nógvar ørnir í Danmark

Havørnir og kongaørnir trívast so væl í Danmark, at tær hava ongantíð verið so nógvar í tali sum nú. Í síðstu viku vóru umleið 500 sjálvboðin fólk úti í náttúruni og taldu ørnir, og við at samanbera úrslitið hjá teimum er fuglafrøðifelagið komið til, at tað eru 156 havørnir og sjey kongaørnir í Danmark í løtuni. Tað er met. Teljingin vísti, at tað eru serliga nógvar ørnir í eystara parti av Danmark, og at tær eisini eru rættiliga spakar, sigur DR.

# 40 ár liðin síðan skopunin

**- Høvdu vit ikki havt fiskavirkið øll hesi árini, trúgvi eg, at Skopunarbygd, sum er ein lutfalsliga ung niðursetubygd, hevði verið nógv minni í dag, enn hon er. Virkið hevur havt velduga stóran týdning fyri Skopun og aðrar bygdir í oynni, sigur Fríðhild Winther, sum í hesi samrøðuni greiðir frá byrjanini og gongdini annars. Mánadagin verður stovningardagurin hildin á virkinum, og tá eru øll vælkomin inn á gólvið**



*- Her hevur búð eitt mergjað fólk, sum upp ígjøgnum árini slóðaði fyri á so nógvum økjum, sigur Fríðhild Winther*

SKOPUN
Vilmund Jacobsen
vilmund@sosialurin.fo

Sunnudag 17. februar eru liðin 40 ár, síðan fiskavirkið í Skopun læt upp av fyrstan tíð.

Eins og í fleiri øðrum bygdum kring landið, vóru fiskakjallarar í Skopun, sum keyptu útróðrarfisk. Menn flaktu fiskin, sum síðan varð saltaður til útflutnings.

Fríðhild Winther, sum í mong ár tilsamans hevur arbeitt á fiskavirkinum í Skopun, var 10 ára gomul, tá ið virkið læt upp.

- Eg minnist so væl hendan leygardagin fyri 40 árum síðan, sum var ein stórur dagur í bygdini. Hetta var ein dagur, sum fólkið í Skopun rættiliga hevði sæð fram til. Vit stóðu uttanfyri virkið og hugdu at, hvussu leikur fór. Menn vóru komnir av Eiði og suður higar at leggja fólki í bygdini lag á, hvussu skerast og arbeiðast skuldi. Um hetta mundið vóru bert nøkur fá fiskavirkir av hesum slagnum í Føroyum, eitt á Eiði og eitt annað í Sørvági. Tá vóru ongar maskinur – og øll framleiðslan fór fram við knívi í hond. Menn lærdu menn, og síðan lærdu menninir kvinnurnar at skera.

### Savnað myndir

Nú fiskavirkið í Skopun hevur 40 á baki, verður dagurin hildin í Skopun mánadagin, 18. februar.

- Vit hava savnað myndir, sum lýsa ein part av søgu felagsins, og hesar kunnu síggjast á virkinum mánadagin. Onkrar myndir eru frá teirri fyrstu tíðini – og fyrstu kassunum av fiski, sum virkið keypti. Onkrar myndir eru eisini tiknar inni á virkinum, og myndir eru av ferðum, sum arbeiðsfólkið hevur verið uttanlands. Aðrar myndir lýsa broytingina, sum hevur verið á virkinum upp ígjøgnum árini. Allar myndirnar eru ikki líka góðar, men tær siga so sína søgu.

Fríðhild sigur seg vóna, at nógv av teimum, sum upp ígjøgnum árini hava arbeitt á fiskavirkinum, koma innaftur á gólvið at vitja, nú føðingardagur er.

- Vit fara at bjóða lagkaku, kringlu, kaffi og te, og vit vóna at síggja nógv fólk aftur, sum gjøgnum árini høvdu sína dagligu gongd her.

Hon vísir á, at fiskavirkið í Skopun hevur havt velduga stóran týdning fyri bygdina.

- Høvdu vit ikki havt fiskavirkið øll hesi árini, trúgvi eg, at Skopunarbygd, sum er ein lutfalsliga ung niðursetubygd, hevði verið nógv minni í dag, enn hon er. Virkið hevur havt stóran týdning, bæði fyri fólk í bestu árum, ungdómin og tey, sum eru komin nakað upp í árini. Eisini hevur virksemið gjøgnum árini havt stóran týdning fyri uppilagstar fiskimenn, sum ikki longur orkaðu baldruta sjólívið.

### Fyrsti lønarseðil

Fríðhild sigur, at hon byrjaði at arbeiða á virkinum í summarfrítíðini, tá ið hon var vorðin eini 14 ára gomul, og tilsamans eru árini vorðin rættiliga mong. Í dag arbeiðir hon í eldrarøktini í oynni, men vaskar á virkinum um kvøldarnar eftir loknan arbeiðsdag.

- Eins og so mong onnur í bygdini, havi eg altíð verið ógvuliga góð við hetta arbeiðspláss. Mær hevur altíð dámt serstakliga væl á virkinum, og tað geri eg framvegis. Eg vaski einar 2-3 tímar um dagin og gjarna eitt sindur longri fríggjakvøld, tá ið arbeiðsvikan á virkinum er liðug.

Ein teirra, sum var til arbeiðis á fiskavirkinum í Skopun fyrsta arbeiðsdag í 1968 – og sum framvegis arbeiðir á virkinum, er Bergtóra Jensen, sum í dag er 65 ára gomul.

- Bergtóra hevur ikki arbeitt øll hesi mongu ár á fiskavirkinum, tí hon hevur eisini tikist við annað arbeiði. Men tað sermerkta er, at hon var við í byrjanini, og hon er við enn í dag.

Fríðhild veit at siga, at Bergtóra enn eigur fyrsta lønarseðilin, sum hon fekk í fiskaarbeiði á táverandi nýggja virkinum.

- Fyri hendan leygardagin, tá ið virkið læt upp, dagarnar í vikuni eftir fram til og við leygardagin eftir, tjenti Bergtóra tilsamans 267 krónur. Hesar dagarnar arbeiddi hon einar 6-7 tímar um dagin. Tá var einki, sum kallaðist yvirtíð, og vit mugu siga, at okkurt hevur Ingeborg Winther fingið burtur úr øll hesi ár, hon hevur verið formaður í Føroya Arbeiðarafelag. Tey, sum vóru undan henni, tóku eisini síni tøk fyri arbeiðarafjøldina.

### Felags ogn

Vit kunnu skoyta uppí, at tað var ikki óvanligt, at fólk á summum fiskavirkjunum arbeiddu fyri vanliga løn – eisini eftir vanliga arbeiðstíð eins og leygardagar tey fyrstu árini, tá ið fiskavirkini stungu seg upp kring landið. Í flestu førum átti bygdarfólkið gjøgnum arbeiðarafeløg og kommununa arbeiðsplássið, og tí vildu tey eisini gera sítt til, at raksturin fekst at hanga saman.

- Í Skopun var tað soleið-